# BØNARLØTAN

**SEPTEMBER 2021 36. árg.**

***1. Mikudagur*** ***Gal. 6.1-18***



## OM-FØROYAR, TeenStreet 2021

Vit takka Gudi fyri TeenStreet-leguna, sum var til stóra signing fyri mong, og fleiri komu til trúgv. Biðið, at tey ungu vaksa andaliga og eins og Móses lata seg brúka, sum tey eru. 220 tannáringar vóru á legu og 100 starvsfólk.

**KRINGVARPIÐ**
Sjónvarpsandakt við Jógvan Zachariassen 19. og 26. sept. og 3. okt.

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)**
Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Hósdagur* — *Orðt. 22.1-29*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Av koronu komu bara 3 fólk yvir, men til stóra hjálp. Nú verða tvær legur, onnur fyri Ellisheimið og hin fyri Familjusentrið, sum leiga húsini, men vit hava andaliga partin. Eli Smith hjálpir til. Seinni kemur Einar Berg m.a. at grava veitir.



**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
**Susan og Øssur Berghamar**
Vit gleðast um aftur at hava møtir í Kristnastovu fríggjakvøld kl. 20 og sunnumorgun kl. 11. Biðið, at tey nýggju lesandi verða varðveitt í trúnni, og at vit fáa vísdóm at leiða arbeiðið.



**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 14, Andreas 12, Kristina 10**
Nú skúlarnir eru byrjaðir aftur, er Niels Pauli í Kristnastovu smáar tríggjar vikur frá 2. sept.

## 3. Fríggjadagur — Ezek. 43.1-27

**ZAREPTA**

Bíbliuskeið 30. aug. - 5. sept., kvinnustevna 10. - 12. sept, mansstevna 17. - 19. sept.



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 16, Trisha 9, Emma 5**

Tvey fólk verða doypt 5. sept. Vit eru Harranum takksom, at hann virkar, hóast avbjóðingar hava verið síðstu tvey árini.

★ Í dag fyllir Leanne Tindalíð 15 ár

## 4. Leygardagur — Ezek. 44.1-18



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 13, Noah 12, Karis 8,**
**Judah 6, Ethan 4**

Vaksandi brotsgerðir í PNG gera viðurskiftini her trupul. Vit hava verið sjúk. Biðið um heilsubót og trygd, nú vit noyðast at ferðast til býin í m.a. læknaørindum. Vit vóna at vera aftur í Mengen fyrst í sept. Biðið um kærleika og vøkstur í Mengen-samkomuni, og at Harrin opnar dyr fyri nýggjari samkomu í aðrari mengenbygd í fjallalendinum. 6000 fólk í fýra bygdum hava ikki hoyrt evangeliið.

## *5. Sunnudagur* *Ezek. 44.19-31*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Vit verða í Føroyum allan sept. Eg luttaki á bíbliuskeiði og mansstevnu, og Judy á kvinnustevnu. Vit ynskja at vitja so nógvar samkomur sum møguligt!



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Barnaarbeiðið er nú aftur hvørt mikukvøld eftir koronu.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Mánadagur* *Ápost. 1.1-26*



**PAPUA NÝGUINEA**
**Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
22. sept. fari eg til PNG at vitja samkomuna í Sorimi og gjøgnumganga umsetingar úr Bíbliuni. Eg skal í sóttarhald í 2 til 3 vikur, áðrenn eg sleppi inn til Sorimi. Biðið eisini fyri nýggja skúlaárinum hjá NTM í North Cotes.

## 7. Týsdagur — Ápost. 2.1-21



**FØROYAR**
**Khuldah og Sámal Mikkelsen**
**Josva 12, Ester 10, Samuel 7**
Didasko byrjar í sept. Hetta er undirvísing fyri 7. flokk mikumorgun í 19 vikur.
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**



**Grønland, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**
Juvel II fór til Grønlands í juni. Maskinólag hevur seinkað. Frá Nuuk til Aasiaat vórðu møtir hildin í øllum bygdunum. Grønlendingar gleddust um at síggja Juvel II aftur, og møtini vórðu væl vitjað. Eg fór av í Aasiaat, tá korona gjørdi um seg av nýggjum. Síðan tá hava møtir verið hildin umborð fyri bert fáum í senn, men fleiri møtir hvønn dag. Ferðin heldur fram til Suður- og Eysturgrønlands.

## 8. Mikudagur — Ápost 2.22-47




**SUÐURAFRIKA, OM**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja Mortensen**
Friggjadag hava vit ungdómsbólkar fyri gentum og dreingjum. Gendubólkurin steðgar tó fyribils, tí ov fáir kvinnuligir leiðarar eru. Biðið eisini fyri gentunum, sum dagliga stríðast við ymiskt, at Harrin verjir og styrkir tær.

## 9. *Hósdagur* *Orðt. 23.1-35*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 15, Lydia 4**

Gott at byrja eftir summarfrí – serliga nú felagstiltøk aftur kunnu haldast. Vit ynskja at fevna tey, vit hava saknað seinasta árið, og at styrkja ungdómsarbeiðið.

⋆ Í dag fyllir Samuel Mikkelsen 7 ár

## 10. *Fríggjadagur* *Ezek. 45.1-25*

**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 10, Tabita 7, Debora 5, Natan 2**

Vit gleðast um, at Cecilia Sivertsen úr Nuuk byrjar á bíbliuskúla á North Cotes College. Biðið fyri henni og hinum næmingunum.

## 11. *Leygardagur* *Ezek. 46.1-24*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Eg eri takksamur fyri umsorgan í Føroyum í summar. Eg umboði Europa í altjóða bíbliumseting fyri deyv. Vit arbeiða fram ímóti, at 347 lond hava týtt Bíbliuna til teknmál í 2033. Vit hava møtir, bíbliuskúla o.m.a.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Sunnudagur* *Ápost. 3.1-26*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 15, Rebekah 13, Lydia 11**

Vit eru takksom, at kurdiska bíbliuappin við ljóði nú er tøk til iOS. Biðið, at mong nýta hetta amboð at lesa og lurta eftir Guds orði. Appin er eisini tøk á Android.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

## *13. Mánadagur* *Ápost.4.1-20*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit endurskoða Skriftina. Nógvar avbjóðingar eru, og vit vóna, at Mixtecumsetingin ber fólkinum Guds boðskap.



**MEKSIKO,**
**Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 17, Victoria 15,**
**Emma Grace 13, Jónatan 11,**
**Markus 9, Evita 6, Joy 4**

Samkoman veksur. Møtini verða væl vitjað, og nógv eru nýggj trúgvandi. Tørvur er á vitjanartænastu, evangeliskum bíbliutímum, sunnudagsskúlalærarum og lærisveinatænastu.

★ Í dag fyllir Josva Mikkelsen 12 ár

## *14. Týsdagur* *Ápost. 4.21-37*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen, Kristian 16**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð,**
**Liljan 16, Leanne 15, Luckas 2**

Hóast koronu eydnaðist at halda tríggjar legur. Tvær familjulegur og ungdómslegu. Barnalegan mátti avlýsast. Vit takka øllum, sum komu yvir at hjálpa, og teimum, sum stuðlaðu. Nú hava vit barna- og ungdómsmøtir. Biðið, at vit náa børnini, sum ikki sluppu á legu. Vit eru fáment.



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit vóna at fara til Diskooynna við Qaamaneq at evangelisera í sept. Biðið, at vit kunnu taka bátin út í Ilulissat ístaðin fyri Aasiaat í ár, tí avbjóðingar eru av stuldri.

## *15. Mikudagur* *Ezek. 47.1-23*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

Okkum tørvar forbøn at hjálpa og vegleiða trúboðarar kring heimin, og mær tørvar vísdóm at finna leiðsluni hjá NTM hóskandi stað at møtast í febr. Vit verða um 40 at tosa um verk Harrans.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

★ Í dag fyllir Kano Mortensen 12 ár og Sigrid Nónstein 14 ár

## *16. Hósdagur* *Orðt. 24.1-34*



**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 14, Svend 13, Terji 9, Petra 7**
Í summar náddu vit við evangeliinum m.a. til Skúvoyar, Nólsoyar og Grønlands. Konsertirnar við Alex Bærendsen-sangum vórðu væl vitjaðar. Ætlanir í heyst eru: Fossnavåg í Norra í sept., Danmark, sóttarløtur á Facebook umframt evangelisk tiltøk í Føroyum. Vanja er heima við børnunum.
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

## *17. Fríggjadagur* *Ezek. 48.1-15*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 13**
Biðið fyri STEVN tiltøkunum. Ein og hvør er vælkomin at tekna seg. Biðið fyri heilsu okkara.



**ÍSLAND, Akureyri**
**Kristín Gerðalíð**



**ÍRLAND,**
**Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Leygardagur* *Ezek. 48.16-35*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 8, Micah 8**
Takk, at vit kundu møta familju og vinum í summar. Gleðiligt nú at hava møtir í salinum. Biðið, at vit finna rætta persónin at leiða barnaarbeiðið.
★ Í dag fyllir Svend í Prestgarði 13 ár

## *19. Sunnudagur* *Ápost. 5.1-20*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Vit sleppa ikki til Turkalands enn. Vitjanir hava verið í fleiri provinsum, og nýggjar samkomur eru settar á stovn. Tey á BCC (Bible Correspondance Course) hava sent evangeliskar teldupakkar og tosað við áhugað. Turkaland er rakt av skógareldi, og nógv eru deyð.

## *20. Mánadagur* *Ápost. 5.21-42*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 4, Timon 2**
Vit halda á at læra kovol málið. Í aug., tá trúboðarar komu at kanna framgongdina at læra málið, bar til at senda illa sært barn í bygdini við tyrlu til nærmasta sjúkrahús. Hóast avbjóðingar trívast vit, tí Gud hevur leitt okkum higar.

## *21. Týsdagur* *Ester 1.1-22*



**Elam Ministries**
**Margretha Højgaard Poulsen**

Iranar í útlegd stovnaðu Elam í 1990 fyri at stuðla iransku undirgrundssamkomuni. Nógv nýggj trúgvandi leggjast afturat. Margretha hevur virkað við Elam síðan 2017. Hon er gift við Hans; tey eiga børnini Jakobu (16) og Áron (14) og búgva í Runavík.

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 10, Leah Ève 7, Abigail 2**

## *22. Mikudagur* *Ester 2.1-23*



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**

Ferðirnar til Slovenia í aug. og Føroya í sept. vórðu báðar avlýstar orsakað av Covid-19. Vit vóna nú at koma til Føroya í okt.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 14**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**





## *23. Hósdagur* *Orðt. 25.1-28*



**FILIPSOYGGJAR**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Tað hevur verið ógjørligt at ferðast til Filipsoyggjar bæði í 2020 og 21. Rættiliga nógv arbeiði skal gerast. Biðið, at vit sleppa aftur til Filipsoyggjar fyrst í 2022.

## *24. Fríggjadagur* *Ápost. 6.1-15*



**ONGLAND, North Cotes, NTM**
**Julie og Sonni Poulsen**

Eg havi brádliga fingið trupulleikar við minninum, og tískil megni eg ikki at undirvísa regluliga. Um onki broytist hjá mær, gevast vit við fulltíðartænastu komandi vár. Vit takka so miriliga fyri samfelagshond øll hesi mongu ár!



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 5, Jude 3, Evelyn 1**



**JAPAN, OM**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 12, Nana 9, Louie 7, Rio 2**

★ Í dag fyllir Jude Poulsen 3 ár

## *25. Leygardagur* *Ápost. 7.1-29*



### SENEGAL, Tongia
### Lív Poulsen

Vit hava aftur bíbliutímar hvørt mánakvøld. Erik undirvísir. Eg lesi eisini við børnunum, áðrenn bíbliutímin byrjar. Kladdan til Matteus-evangeliið er liðug, og eg rættlesi nú tekstin við ymiskum bygdarfólkum. Ungur bygdarmaður hevur umsett 1. Mósebók aftur frá badiaranke til franskt fyri at kanna dygdina. Eg rættlesi fronsku umsetingina, áðrenn hon kann sendast til umsetingarráðgevan.

## *26. Sunnudagur* *Ápost. 7.30-60*



### SENEGAL, Dakar
### Marion og Hans Arni Jensen
### Ryan 12

Ætlanin var at vera í Guinea í juli, men vit fingu ikki visum. Tí hava vit verið í Dakar alt summarið. Í løtuni fyrireika vit skeið fyrst í okt. fyri okkara trúðboðarum. Hans Arni hevur ábyrgdina at fáa røttu skjølini til vega, soleiðis at luttakararnir kunnu fáa visum. Biðið, at hetta eydnast, og at øll kunnu koma.



### VENESUELA, Puerto Ordaz, NTM
### Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

## *27. Mánadagur* *Ester 3.1-15*



### TÝSKLAND, Hückeswagen
### Ethnos 360
### Wina og Benjamin Hansen
### Noah Elias 9

Fleiri ungir týskarar bíða eftir at sleppa til Brasilia, Indonesia og Papua Nýguinea at tæna við Ethnos 360. Biðið, at tey fáa innferðarloyvi, og at Indonesia opnar landamørkini aftur. Sonur okkara Noah er júst byrjaður í 4. flokki; okkum tørvar vísdóm at ala hann at elska Harran.

## *28. Týsdagur* *Ester 4.1-17*




### TEILAND, Chiang Mai
### Corine og Sørin Joensen
### Eli 16, Aron 9, Noah Kristian 7

Støðan er framvegis ótrygg í Teilandi. Talið av smittaðum av Covid-19 heldur á at vaksa, og nógvur politiskur ófriður er. Avmarkingar gera, at bert 20 fólk kunnu savnast. Tað ávirkar bæði tænastuna hjá The Well og okkara samkomu.

**Útgevari** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd** Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
**Uppseting** Palli Skorheim, tel. 290087



## FILIPSOYGGJAR, Manila, NTM
## Liz og Ragnar Niclasen.

Ein, vit arbeiddu saman við, hevur sagt okkum, at mammubeiggin hevði lisið um ofrini, og hvussu Jesus var endaliga og fullkomna ofrið, sum ikki var neyðugt at endurtaka. Hetta gleddi meg ómetaliga nógv at hoyra. Nú sleppa vit ikki aftur til Filipsoyggjar fyrr enn eftir nýggjár. Ímeðan rættlesi eg tilfarið til Tessalonikabrøvini og geri nýtt tilfar.



## FILIPSOYGGJAR, Naplud, NTM
## Monika og Tim Sharp
## Ragnhild 17, Rebekka 16, Hanna 13

Vit eru í farloyvi í Føroyum.




## OM, LOGOS HOPE

**Myndasavn** pallis76@yahoo.dk
**Prent** Føroyaprent, tel. 314555
**Teldupostur** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða** www.kbs.fo

©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK

**162 síður 190 kr.**




Helen Berhane greiðir frá, hvussu hon í meir enn tvey ár sat innistongd í eini bingju í heimlandinum Eritrea orsakað av trúgv síni á Jesus. Helen varð dømd av myndugleikunum, tí hon hevði sagt øðrum frá um trúgv sína við vitnisburði og sangi. Tað er ótespiligt – men samstundis eggjandi – at lesa, hvussu Berhane sang lovsangir og uggaði hinar fangarnar, samstundis sum hon varð illa viðfarin av fangavørðunum. Frásøgnin um Helen Berhane er ein áminning um, at vit ongantíð eiga at rokna frælsi okkara sum nakað sjálvsagt, og at vit skulu brúka frælsið til Guds æru.

Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið mán.-frí. kl. 14:00-17:30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo